# Landsbyggifelagið verður við í Lopra

*Hevur fingið ein av fýra sáttmálum. Arbeiðið umfatar ýmsar kanningar og forprojektering av borðiokinum*

EYDUN KLAKKSTEIN

Dansk Olie & Naturgas (DONG) boðaði um vikuskiftið frá, at fýra teir fyrstu sáttmálarnir viðvíkjandi Lopra-borðingini, eru við at vera klárir. Tríggir sáttmálar eru bjóðaðir donskum og útlendskum fyritøkum, og ein sáttmáli er bjóðaður føroyska Landsbyggifelagnum.

DONG stendur fyri arbeiðnum í Lopra. 18 altjóða oljufeløg fíggja arbeiðið, og Dansk Operatørselskab (Danop) leggur borðingina, sum væntandi byrjar fyrst í mai. Til rættis Jarðfrøðissavnið og Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelser virka sum konsulentar í arbeiðnum.

Í løtuni verður arbeitt við at leggja sjálva borðingina til rættis, og sáttmálar verða gjørdir um innkeyp, tænastur og annað.

DONG og Danop hava havt fleiri fundir í Føroyum, m.a. við Føroya Oljuídnað, har greitt hevur verið frá teimum sáttmálum, sum skulu gerast í sambandi við Lopra-borðingina. Meginparturin av sáttmálunum snúgva seg um veitingar, sum krevja stóran serkunnleika, og sum hvørki føroyskar ella danskar fyritøkur kunnu bjóða fram.

DONG upplýsur, at tey 18 oljufeløgini, aftan fyri projektið, leggja dent á, at føroyskar fyritøkur sleppa at geva tilboð uppá viðkomandi uppgávur. Mest upplagdu økini fyri føroyskar fyritøkur, eru flutningur av útgerð millum útheimin og Lopra, gerð av borløkinum, og ýmsar tænastur undir sjálvari borðingini.

Higartil eru fýra sáttmálar gjørdir. Feløgini sum eru umfataði av hesum sáttmálum eru svEitsiska Hydril S.A., norska Cooper Oil Tools, danska Mærsk Contractors, og føroyska Landsbyggifelagið, sum fer at gera jarðartøkniligar og umhvørvisligar kanningar og forprojekteringina av borðiokinum.



*Arne Rosenkrands Larsen kannar seg við jarðfrøðinga í Suðuroynni saman við øðrum oljuumboðum. Mynd jan*



*Tá oljufeløgini vitjaðu í Lopra herfyri. Mynd jan*

---

*Texaco og Conoco skipa samtak til Føroyaleiðina*

# Føroyska økið sera áhugavert

*Tvey av heimsins størstu oljufeløgum, Texaco og Conoco, hava nú skipað eitt samtak, sum skal vera við í leitingini eftir olju og gassi á føroyskum øki. Hesi feløgini eru millum tey mest virknu vestan fyri Hetland. Nú vilja tey sameina kreftirnar og brúka vitan og royndir frá kanningunum har, á føroyskum øki*

Jan Muller

Mánakvøldið komu umboð fyri tey bæði stóru oljufeløgini, Texaco og Conoco til Føroya. Tey høvdu fund við oljufyrisitingina í gjár, har tey greiddu frá nýggja samtakinum, sum tey hava skipað við leiting á føroyskum øki fyri eygað.

Bent Baumback frá Texaco sigur við Sosialin, at føroyska økið sær so mikið áhugavert út, at tey bæði feløgini hava gjørt av at sameina kreftirnar og brúka ta vitan og royndir, sum tey hava gjørt á enskum øki, í føroyskum øki.

-Vit hava drúgvar royndir vestan fyri Hetland og eru millum tey oljufeløgini, sum hava flestar lisensir og operatøruppgávur. Tað er øll orsøk til at halda, at føroyska økið er eins áhugavert og við eins nógvum møguleikum sum økið vestan fyri Hetland, sigur hann.

Hann sigur víðari, at feløgini hava keypt nógv data inn frá kanningum í økinum og hesi eru tey í løtuni í ferð við at viðgera.

*Halda tit olju er á føroyskum øki?*

-Lat meg siga tað soleiðis: Føroyaleiðirnar síggja sera áhugaverdar út.

Bent Baumback sigur víðari, at ætlanin er at fáa eitt oljufelag aftrat við í samtakið. Teir hava samráðingar við okkurt felag, men hesar eru enn ikki liðnar.



*Bent Baumback var í Føroyum, tá oljufeløgini kunnaðu seg um Lopraboringina. Her er hann saman við leiðaranum á oljufyrisitingini í kolanámunum í Hvalba. Mynd jan*